# Jógvan verður stjóri

**Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, heldur ikki at talan verður um ein nýggjan stovn, tá Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya leggja saman um ársskiftið, og tí er ikki neyðugt at lýsa stjórastarvið á samanløgdu stovnunum leyst**



*– Eg havi valt hesa loysnina, tí eg kenni meg tryggan við hana og eg havi breiðan politiskan meiriluta fyri henni. Eg meti tí ikki, at eg bróti nakran almennan setanarpolitikk, sigur landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni*

SAMANLEGGING ÚF/SVF
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, hevur ongar ætlanir um at lýsa stjórastarvið leyst, tá Sjónvarp- og Útvarp Føroya leggja saman 1. januar 2005.

– Jógvan Jespersen hevur áður prógvað sín førleika, tá hann stóð á odda fyri báðum stovnunum, og hann hevur eisini drúgvar royndir úr báðum miðlum. Hann er eisini tænastumaður, og er settur at umskipa samanleggingina, og tá tann tilgongdin er gjørt, heldur hann á sum stjóri, sigur Jógvan á Lakjuni.

### Bróta ikki setanarpolitikk

Formaðurin í Starvsmannafelagnum, Gunnleivur Dalsgarð heldur, at samanleggingin av Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya fer at hava ein nýggjan stovn við sær, og tí eigur stjórastarvið at lýsast leyst.

Hesum er lands-stýrismaðurin ikki samdur í. Sum hann sær tað, er talan um ein tilgongd, har Útvarp Føroya er tann berandi stovnurin av tí einføldu orsøk, at ÚF er tann stovnur, ið fyrisitinarliga og búskaparligaer er betur fyri. Tað er tí eisini heilt natúrligt at lata útvarpstjóran leiða hesa tilgongdina.

Bæði Jógvan Jespersen og fyrrverandi stjórin í Sjónvarpi Føroya, Mikkjal Helmsdal, hava áður sagt, at teir halda tað er rætt, at stovnarnir eiga at verða hvør sær, tí talan er um tvær grundleggjandi ymiskar uppgávur hjá loftmiðlunum.

Hesari meting er landsstýrismaðurin heldur ikki samdur við.

– Eg veit, at teir hava sagt hatta, men eg eri ikki samdur við teirri meting. Eg haldi ikki tað ber til at siga, at talan verður um ein nýggjan stovn, tí í veruleikanum tosa vit um eina umskipan av tveimum stovnum, sigur Jógvan á Lakjuni.

Hann vísir annars til, at í flestu grannalondum okkara eru útvarp og sjónvarp skipað í sama stovni t.d. DR í Danmark. Hetta gevur styrki og betri møguleikar at standa ímóti teimum stóru broytingunum og avbjóðingunum á kringvarpsøkinum, sum eru fyri framman. Hetta skuldi eisini givið starvsfólkunum betri arbeiðsumstøður og møguleikar.

Spurdur um tað ikki er siðvenja, at lýsa øll almenn størv leys, svarar landsstýrismaðurin, at í prinsippinum er tað rætt, men í hesum føri er eftir landsstýrismansins meting ikki talan um eitt nýtt starv, og tí metir Jógvan á Lakjuni ikki, at tøvur er á at lýsa starvið leyst.

– Eg havi valt hesa loysnina, tí eg kenni meg tryggan við hana og eg havi breiðan politiskan meiriluta fyri henni. Eg meti tí ikki, at eg bróti nakran almennan setanarpolitikk, sigur hann.

# Stjórastarvið skal lýsast leyst

**Formaðurin í Starvsmannafelagnum, Gunnleivur Dalsgarð, heldur, at stjórastarvið í samanlagda Útvarp- og Sjónvarp Føroya eigur at verða lýst leyst. Talan verður um ein nýggjan stovn, og tí skal sjálvsagt stjórastarvið lýsast leyst, sigur hann**

SAMANLEGGING ÚF/SVF
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

"Um landstýrismaðurin í mentamálum Jógvan á Lakjuni ikki skal koma í søguna sum tann ringasti fíggindin hjá fríari pressu í landinum, skyldar hann Føroya fólki, at starvið verður boðið út, so væl kvalifiseraðir umsøkjarar eisini hava møguleikan at søkja. Eg helt, at tað var eitt krav, at tíðandi størv hjá tí almenna skuldu bjóðast út".

Í Sosialinum og Dimmalætting skrivaði stjórin á útvarpsrásini Rás 2, Petur Jacobsen, eitt hvassorðað lesarabræv, ið serliga var vent ímóti almenna útvarpinum, Útvarpi Føroya. Petur Jacobsen helt millum annað, at stjórastarvið í samanløgdu stovnunum ÚF og SvF eigur avgjørt at verið boðið út, so øll hava møguleikan at søkja stjórastarvið.

Stjórin á Rás 2 stendur eftir øllum at døma ikki einsamallur í málinum. Bæði formaðurin í Starvsmannafelagnum, Gunnleivur Dalsgarð, og formaðurin í Blaðmannafelagnum, Edvard í Skorðini Joensen, halda eisini, at landsstýrismaðurin eigur at lýsa stjórastarvið leyst.

### Nýggjur stovnur

Í løtuni arbeiðir Mentamálaráðið við at broyta kringvarpslógina, so lógarheimild fæst fyri at leggja Útvarp- og Sjónvarp Føroya samankunnu. Sum skilst er Jógvan Jespersen farin undir fyrireikingarnar at leggja stovnarnar saman.

Gunnleivur Dalsgarð heldur, at tá Jógvan Jespersen er liðugur við skipa stovnarnar sum ein stovn, eigur stjórastarvið at lýsast leyst.

– Talan verður um ein fullkomiliga grundleggjandi nýggjan stovn, og tí skal stjórastarvið sjálvsagt lýsast leyst, sigur formaðurin í Starvsmanna-felagnum.

Gunnleivur byggir sína áskoðan á, at bæði fyrrverandi sjónvarpsstjórin, Mikkjal Helmsdal og útvarpsstjórin, Jógvan Jespersen, áður hava sagt, at ÚF og SvF eiga at virka hvør í sínum lagi, tí uppgávurnar hjá stovnunum er grundleggjandi ymiskar.

– Tað sigur seg sjálvt, at tá stovnarnir áður hava kunnað virkað hvør sær, tí uppgávurnar hava verið ymiskar, og nú brádliga skulu leggjast saman, verður talan um ein grundleggjandi nýggjan stovn, og tá skal starvið lýsast leyst heldur, formaðurin í Starvsmannafelagnum.




*–Tað sigur seg sjálvt, at tá stovnarnir áður hava kunnað virkað hvør sær, tí uppgávurnar hava verið ymiskar, og nú brádliga skulu leggjast saman, verður talan um ein grundleggjandi nýggjan stovn, og tá skal starvið lýsast leyst heldur, formaðurin í Starvsmannafelagnum.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Nýggjar kreftir

Gunnleivur Dalsgarð heldur, at tað hevði tænt samanlagda stovninum væl, at stovnurin fekk møguleika at fáa bestu kreftirnar inn á nýggja stovnin.

– Tað er ein skylda hjá tí almenna at royna at fáa tey bestu fólkini til størvini. Sjálvsagt skulu øll hava møguleika at søkja nýggja starvið. Okkara felag hevur nógv fólk sum arbeiðir har, og vit ynskja sjálvsagt bestu arbeiðstreytir fyri okkara limum.

Gunnleivur Dalsgarð vónar, at Jógvan á Lakjuni tekur boðini frá Starvsmannafelagnum til eftirtektar, og lýsir starvið leyst eftir, at Jógvan Jespersen er liðugur við tilrættarleggja samanleggingina.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum vil kortini ikki siga, hvør avleiðingin verður, um landsstýrismaðurin ikki velur at lýsa starvið leyst.

### Samdur

Føroya Blaðmannafelag hevur fleiri áhugalimir, sum arbeiða í Sjónvarpi Føroya og Útvarp Føroya. Formaður felagsins, Edvard í Skorðini Joensen, tekur undir við Gunnleivi Dalsgarð

– Tað er vanligur setanarpolitikkur, at øll almenn størv skulu lýsast leys, og tí er eingin ivi um, at stjórastarvið eigur at lýsast leyst. Tað er kortini einki sum forðar Jógvani Jespersen at søkja og fáa starvið, heldur formaðurin í Blaðmannafelagnum.

Edvard í Skorðini vísir á, at í løtuni er Jógvan Jespersen bert settur sum fyribilstjóri, og tá fyrireikingararbeiðið er av, verður talan um nýggjan stovn, sum ferð at hava stórar broytingar við sær, og tá skal starvið lýsast leyst.



# Strandalond samráðingar um svartkjaft

SAMRÁÐINGAR
*Tíðindaskriv*

Samráðingarfundur millum strandarlondini (Føroyar, ES, Noreg, Ísland umframt Russland sum serliga innboðið) um felagsumsiting og býtið av svartkjaftastovninum verður hildin á Hotel Hafnia í Tórshavn 28. og 29. september. Fundurin er tann 14. millum londini, síðan samráðingarnar tóku seg upp í 2000.

Sum ein høvuðspartur, tá ið tað snýr seg um svartkjaft, hava Føroyar áhaldandi víst á, at ein varandi býtislykil millum strandarlondini eigur at taka støði í fleiri viðurskiftum, t.e. fiskiskapur, økistilknýti, bundinskapur, atkoma og gransking.

Svartkjaftastovnurin hevur sera stóran týdning fyri Føroyar, bæði sum beinleiðis tilfeingi til íðnaðarframleiðlsu og til matna, og eisini í sambandi við tann áhugan, sum er hjá øðrum londum at veiða svartkjaft í føroyskum øki. Í mun til onnur øki kann svartkjaftur fiskast lønandi í føroyska økinum at kalla alt árið.

Gongdin í fiskiskapinum tey seinastu árini hevur víst seg at vera nógv øðruvísi, enn hvat ið vísindaráðgevingin annars hevur roknað við. Stovnurin hevur víst seg at tola eina størri veiði enn hildið varð fyri tveimum árum síðani, tá ið ICES mælti til at stegða fiskiskapinum heilt í 2002.



*Kate Sanderson er samráðingarleiðari hjá føroysku sendinevndini*

Í 2003 mælti ICES til eina heildarkvotu á 600.000 t, meðan samlaða veiðan í 2003 var 2.3 millión tons. Fyri 2004 mælti ICES til eina heildarkvotu á 950.000 t. Sambært seinastu tølini hjá Fiskiveiðieftirlitinum hava føroysk skip fram til 22. september í ár veitt tilsamans 272.000 t tons av svartkjafti, harav eini 115.000 t í føroyskum sjógvi. Útlendsk skip hava veitt 205.000 t í føroyskum øki higartil í ár. Í juni í ár var samlaða veiðan komin upp á 1.6 m t. Fyri 2005 mælir ICES til eina heildarkvotu á 1.075.000 t.

Á strandalandafundinum týsdagin fer Jan Arge Jacobsen, fiskfrøðingur at leggja fram nýggjastu fyribils úrslit hjá einum arbeiðsbólki um svartkjaft, sum strandarlondini settu í fjør heyst til tess at útgreina spurningar viðvíðjandi m.a. útbreiðslu, ferðamynstri, stovnsbygnað og -samansetning. Hóast útlitini fyri svartkjaftastovnin eru bjartari enn higartil hildið, valdar framvegis óvissa um, hvussu stovnurin fer at útvikla seg undir støðugt ótálmaðum veiðitrýsti, sum fiskiskapurin er í løtuni.

- Tað er eyðsýnt, at vit mugu gera okkara til at finna eina varandi semju millum strandarlondini um, hvussu svartkjaftastovnurin verður umsitin og býttur. Ein burðardygg gagnnýtsla av svartkjafti undir tryggum kørmum og við einum rættvísum býti millum londini kann hava uppaftur størri týdning fyri Føroyar í framtíðini, heldur løgmaður.

– Í føroysku sendinevndini verða: Kate Sanderson, (samráðingarleiðari) og Kaj P. Mortensen frá Løgmansskrivstovuni, Jens Helgi Toftum úr Fiskimálaráðnum, Hjalti í Jákupstovu og Jan Arge Jacobsen frá Fiskirannsóknarstovuni, umboð fyri Reiðarafelagið, umframt Árni Olafsson, umboðandi danska uttanríkismálaráðið.

# Vilt tú vera við at hjálpa?

HEIMAMISSIÓNIN
*Tíðindaskriv*

Sunnudagsskúlabørn hjá Heimamissiónini í Føroyum eru í hesum døgum við í eini verkætlan, sum hevur til endamáls at samla inn fløskur eina ávísa tíð. Pengarnir, sum koma inn, fara til arbeiðið, sum Jórun (fødd Fonsdal úr Vestmanna) og maður hennara Nurlan (úr Kirgisia) gera millum gøtubørn í Kiev, Ukreina.

Sunnudagsskúlabørnini hjá Heimamissiónini í Føroyum hava samlað pengar í bússur, og gav tað 295.741,20 kr. sum hjartaliga verður takkað fyri.

Av tí at tørvurin á einum barnaheimi er sera stórur, og pengar resta í heitti sunnudagsskúlin í missiónshúsinum á Glyvrum á Landssunnudagsskúlanevndina hjá HM, um loyvi enn eina fer at heita á sunnudagsskúlabørn og húski teirra og annars øll, ið vildu vera við í einari tílíkari verkætlan, um at hjálpa børnum har neyðin er stór.

Verkætlanin endar 31. oktober og vilja vit tí heita á alt Føroya fólk, skúlar, arbeiðspláss og stovnar um at stuðlað verkætlanini soleiðis, at um tit hava fløskur standandi og vilja geva tær til eitt gott endamál, vinarliga seti tykkum í samband við sunnudagsskúlan á staðnum.

Tá verkætlanin endar, verða pengarnir samlaðir saman og settir inn á konto, saman við tí, sum kom inn, tá samlað var í bússum. Um spurningar eru, kann ringjast til fyrireikararnar á tel. 266217.

Við bøn til Guðs um signing. Hann, sum er hin sami í dag, sum tá hann mettaði 5000 menn, umframt kvinnur og børn, við 2 fiskum og 5 breyðum. Hann er mentur at signa hetta verk, so tað verður teim neyðstøddu og heimleysu til signingar.

Hav hetta í huga, at Jesus sigur: »So satt sum tit hava gjørt hetta móti einum av hesum minstu brøðrum mínum, tá hava tit gjørt tað móti mær« (Matt. 25,40).

# Samkoman…Bjarging Føroya fólks

FILADELFIA
*Tíðindaskriv*

Møguleiki hevur verið hesar dagar at hoyra fólk, ið hava gott samband við deyð. Hesi deyðu kunnu veita hjálp og ugga. Ja mangt er broytt seinastu árini í okkara vakra landi, ikki bara koma signalir út um, at búskapurin rillar, men nú er heilt sjónligt, at fólkasálin í Føroyum rillar sum ongantíð fyrr. Fólk søkja aðrar leiðir. Vit spyrja aðrar tjóðir, sum eru fallnar langt niður moralskt, um ráð. Og vit vilja líkjast teimum!!!

Eru vit á somu leið nú, móti einum moralskum skrælli?

Dagsins trupulleikar í alivinnuni, rækjuflotanum, eru bert nakrir av fáu trupulleikunum, vit hoyra um dagliga. Sannleikin í hesum málum kann ikki noktast, men hvussu langur skal listin verða, og hvussu leingi skal hetta halda á?

Hvat skal til fyri at bøta um støðuna í landi okkara? Aðra samgongu ella størri innlit í fjølbroyttum religiónum?

Vit minnast kreppuna í 90´unum! Hvat var tað sum bjargaði okkum? Jú, tað at vit fóru á knø okkara og bóðu Gud um fyrigeving fyri at vit, Hansara fólk, høvdu forsømt Hann og tað verk, Hann hevði sett okkum til. Noyðast vit at síggja enn eina kreppu, áðrenn vit fara niður aftur á knøini? Vit minnast, at Gud svaraði okkum, so fiskifrøðingar og onnur lærd fólk enn í dag standa og undrast á hvaðani fiskurin kom.

Vit eru vís í, at Samkoman er bjarging Føroya fólks. Vit mugu reisast og vera sterk í Gudi, so vit kunnu hoyra frá Honum, ið reis upp frá teimum deyðu og livir í dag. Nú er tíðin búgvin til júst tað. Í hesum sambandi skipar Filadelfia í Havn fyri einari heyststevnu í døgunum 30. september til 3. oktober. Evnið á stevnuni er: »Samkoman… Bjarging Føroya fólks«.

Møti verða frá hósdegi til sunnudag. Karmarnir um stevnuna eru sera breiðir. Leygardag seinnapart verður ymiskt á skránni. Skipað verður fyri bowling, ríðing og túri til Kirkjubøar við ferðaleiðara, endað verður á Fornminnissavninum. Spennandi tiltøk verða eisini fyri børn m.a. barnamøti og familjumøti.

Filadelfia samkoman ynskir við hesum orðum at bjóða øllum at verða hjartaliga vælkomin.

# DJ show og karaoke í Badminton høllini

DJ-SHOW
*tíðindaskriv*

Tað er nakað síðan sera vælumtøkti DJ-cool, Martin Kjærbo hevur verið DJ í Badmintonhøllini, men nú leygarkvøldið fer hann saman við Jákup Jacobsen sum verður frásøgumaður at rocka húsið.

Tey sum ætla sær til Havnar úr Eysturonni og niðan í Badmintonhøllina til dj-show og karaoke leygarkvøldið tann 2.okt, kunnu ringja á tlf. 22 51 63 at bíleggja sær pláss við bussi. Sum nakað nýtt er túrurin til Havnar og aftur ókeypis, um nóg nógv tekna seg

# Afturvaldur formaður

AÐALFUNDUR
*tíðindaskriv*

Føroya Tannlæknafelag hevði aðalfund á Hotel Hafnia 24. september.

Formaðurin, Kaj Antoniussen, og kassameistarin, Unnur Jensen, vórðu afturvald. Skrivarin, Unn Jacobsen, ynskti ikki at halda fram í nevndini. Í hennara stað varð Sigga í Garðastovu vald.

Nýggja nevndin er soleiðis mannað við Kaj Anthoniussen, formanni, Siggu í Garðastovu, skrivara, og Unnur Jensen, kassameistara.

# Mia sum forkvinna

Friðarbogin, felagið hjá teimum sam- og tvíkyntu, hevði aðalfund fyrr í hesum mánaðinum.

Her gjørdi aðalfundurin av, at nýggj forkvinna í felagnum er 26 ára gamla Mia Wenningstedt úr Havn.

-jm